# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Nýggi sølu- og marknaðarstjórin á Smyril Line byrjaður

**Mánadagin byrjaði Niels Kreutzmann í nýstovnaða starvinum sum deildarstjóri fyri øllum ferðafólkavirkseminum hjá Smyril Line**



Niels Kreutzmann er 38 ár, útbúgvin cand. merc. og hevur drúgvar royndir innan ferðavinnu. Hann kemur úr einum starvi sum marknaðarstjóri hjá Bornholms Trafikken, har hann hevur starvast síðani august 2000.

Áðrenn hetta var Niels Kreutzmann marknaðarstjóri í Grønlandsfly í trý ár, har hann starvaðist í tilsamans 13 ár, áðrenn hann kom til Bornholms Trafikken. Niels Kreutzmann hevur sitið í ovasta leiðslubólkinum í báðum feløgum og hevur tilsamans sjey ára royndir sum marknaðarstjóri innan skipa- og flogferðslu.

Niels Kreutzmann, sum er uppvaksin í Nuuk, hevur føroyska konu og hevur verið nógv í Føroyum bæði privat og í ferðavinnuhøpi, haðani hann eisini hevur góðan kunnleika um ferðavinnuna í Norðuratlantshavi.

- Hesa fyrstu tíðina fari eg at brúka til at fylgja teimum ætlanum, sum Smyril Line hevur lagt fyri hetta árið, og síðani fari eg at seta út í kortið fyri 2005, sigur Niels Kreutzmann.

Saman við Óla Hammer, stjóra, fer nýggi sølu- og marknaðarstjórin hjá Smyril Line eisini at brúka komandi tíðina til ferðast runt til agentar og tosa við starvsfólkini á teimum ymsu deildunum hjá felagnum.

Nevndin í Smyril Line samtykti í november í fjør at søkja eftir einum sølu- og marknaðarstjóra við altjóða royndum og hollari útbúgving á økinum. Hetta varð gjørt eftir tilmælum í eini eftirmeting av søluni og marknaðarføringini hjá felagnum, sum norðurlendska ráðgevandi fyritøkan, Ementor, og føroyska, Fjølmiðlaráðgevingin, gjørdu.

## Miklós Ölveczky deyður



Tá farið varð undir at byggja Norðurlandahúsið fyri stívliga 20 árum síðani, vórðu serfrøðingar av ymiskum slag og úr ymiskum londum tiknir við sum ráðgevarar. Ein teirra var Miklós Ölveczky, sum var við frá fyrstu løtu.

Miklos varð føddur í býarpartinum Buda í ungarska høvuðsstaðnum Budapest 7. august 1938, og hann doyði nú 21. februar, 65 ára gamal. Hann fekk útbúgving sum sivilverkfrøðingur og varð leiðari av sjónleikatekniskur útbúgvingini á filmsakademiinum í Budapest. Seinni gjørdist hann tekniskur stjóri á ungarska Tjóðleikhúsinum.

Konan og hann fóru úr Ungarn nakað eftir uppreisturin í 1956, sum Sovjetsamveldið bardi niður, og fyrst í sjeytiárunum komu tey til Malmø, har hann í fleiri ár var sjónleikatekniskur leiðari á býarleikhúsinum. Í 80-árunum fluttu tey til Noregs, og har hevði hann ein stóran leiklut í endurreisnini av Tjóðleikhúsinum í Oslo eftir eldsbrunan.

Hann var í sjeyti-, áttati- og nítiárunum roknaður fyri at vera ein leiðandi serfrøðingur í funktiónsteknikki í mentanarútbúnaði. Tað gjørdi, at hann virkaði sum ráðgevari í fleiri stórum prosjektum innanfyri leikhús, m.a. í Oslo, Reykjavík og Keypmannahavn. Somuleiðis var hann høvuðsráðgevari, tá Vetrarolympiadan varð hildin í Lillehammer í Noregi í 1994.

Miklos var giftur við Cecília, sum eisini er úr Ungarn. Hon er sjónleikari og starvast sum dramaturgur á Norska Leikhúsinum í Oslo.

Tilknýti hansara til Føroyar kom, sum longu nevnt, við Norðurlandahúsinum. Hann var ráðgevari hjá arbeiðsbólkinum, sum gjørdi avgerðarstøðið fyri Norðurlandahúsið. Somuleiðis var hann ráðgevari fyri arkitektakappingina, ráðgevari hjá bygginevndini, og hann prosjekteraði sjálvur teknikkin í húsinum. Í fleiri ár eftir, at húsið var liðugt, var hann ráðgevari á tekniska økinum. Hansara spesiali var fleirfunktiónsrúm sum td. Norðurlandahúsið.

Miklos var tí nógvar ferðir í Føroyum. Hann var sera væl dámdur, blídligur, fyrikomandi og mentaður maður.

Tá kommunisman fall í 1989-90 fekk Miklos aftur møguleika at vera virkin í Ungarn, og hann virkaði har, líka til hann doyði. Hann var høvuðsráðgevari, tá Ungarska Tjóðaroperan varð renoverað.

Miklos var sjúkur tey seinastu árini. Cecília og hann fingu tveir synir, Chaba og Bence. Teir búgva báðir í USA.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



## Gongur illa at stovnseta arbeiðspláss

Síðani seinastu arbeiðsmarknaðarfrágreiðing úr USA, ið varð kunngjørd fyri mánaða síðani og sum gjørdist eitt vónbrot, hevur allur fíggjarheimurin bíðað eftir, at henda frágreiðing aftur skuldi almannakunngerðast farna fríggjadag. Eins og seinast gjørdist frágreiðingin eitt vónbrot, tí einans 21.000 arbeiðspláss vóru sett á stovn í februar mótvegis teimum væntaðu 130.000. Samstundis varð talið fyri januar dagført skeivan vegin.

Frágreiðingin fekk sera stóra ávirkan á marknaðirnar fríggjadagin. Beint eftir kunngerðina viknaði dollarin 1,5% mótvegis donsku krónuni og evruni samstundis sum t.d. rentan á danska 10-ára statslánsbrævinum lækkaði 0,12%-stig. Hetta svarar til, at kursurin hækkaði 0,95 stig. Sum heild góvu partabrøv sær lítið fær um vánaligu frágreiðingina. M.a. lækkaði KFX einans 0,23%.

Vánaliga arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin fer at ávirka, serliga lánsbrøv og gjaldoyru, komandi vikurnar. Orsøkin er, at lít varð sett á, at hendan frágreiðing veruliga fór at staðfesta framgongdina í USA, og at henda fór at fáa FED at geva boð um rentuhækking í USA. Áherðsla skal leggjast á, at frágreiðingin ikki setur framgongdina í USA í vanda, men førir við sær, at rentur sum heild ikki hækka í bræði. Samstundis vil evran styrkna aftur og halda renturnar á lágum stigi. Hetta er sostatt gott fyri bæði láns- og partabrøv.

Hóast ECB ikki lækkaði rentuna á fundi teirra í farnu viku, hevur arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin aftur økt um sannlíkindið fyri einari slíkar. Kortini meta vit, at evropiska rentan verður óbroytt fram til endan av 2004.

Í farnu viku kunngjørdi TDC ein góðan roknskap við bjørtum útlitum. TDC hækkaði um 3% kunngerðardagin. Hesa vikuna kunngerða m.a. Lundbeck, Group4Falck, ISS og Deutsche Telecom roknskap.

Av tí at fáar búskaparligar kunngerðir eru hesa vikuna, fer vikan at verða merkt av gongdini í farnu viku. Lánsbrævrenturnar fullu nógv og tí er møguleiki fyri vinningsstaðfesting, soleiðis at hesar aftur hækka eitt vet. Væntast kann, at partabrøvini framhaldandi fara at standa seg væl hesa vikuna.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,41% | -0,10% |
| 5 ára lánsbræv | 3,43% | -0,13% |
| 10 ára lánsbræv | 4,13% | -0,10% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 280,2 | 0,6% |
| OMX, Svøríki | 718,3 | 2,0% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.797,9 | 0,8% |
| S&P 500, USA | 1.156,9 | 0,1% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 109,59 | 0,3% |
| Evru Lánsbrøv | 165,75 | -0,2% |
| Norrøn Partabrøv | 82,50 | 2,1% |
| Altjóða Vøkstur | 65,91 | 3,4% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 602,41 | 0,7% |
| EUR | 745,15 | 0,0% |
| GBP | 1.113,32 | -0,5% |
| NOK | 85,83 | -0,1% |

*Renta og kursir kl 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# Fiskimenn skulu hava neyðugu hvíldina

**Føroya Fiskimannafelag fer at seta eina kanning í verk av arbeiðstíðini umborð á fiskiskipum. Ætlanin er at kanna dagbøkur og døgnlistar og senda spurnarbløð umborð á skipini, har fiskimenn verða spurdir um arbeiðstíð og frívakt**

SÁTTMÁLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag undirskrivaðu, 3. mars, nýggjan sáttmála, sum verður galdandi fram til, 1. desember 2004. Sáttmálin kann sigast upp við tveimum mánaðar freist til, 1. desember 2004. Upprunaliga gekk sáttmálin út, 1. desember 2003, men partarnir samdust í fyrsta lagi um at framleingja tá galdandi sáttmála til 15. januar 2004. Semja var um, at gamli sáttmálin skuldi vera galdandi, so leingi samráðingar vóru.

Fyrsti samráðingarfundur var júst 15. januar, og tá legði Fiskimannafelag fram síni ynski um broytingar.



*– Ábyrgdin hjá fiskimanninum er, at tað ikki skal loysa seg at seta heilsuna í vága fyri at fáa uppí lastina nakrar tímar fyrr, enn tað annars vildi tikið, sigur Fiskimannafelagið*

### Hvíldartíðin haldast

Eitt av høvuðynskjunum hjá FF var, at lógarásetta hvíldartíðin sambært grein 55 í sjómanslógini verður hildin.

Í nýggja sáttmálanum staðfesta feløgini, at lógarásetingin er sett fyri at tryggja heilsuna hjá fiskimonnum, og tí skal lógin haldast.

Sambært lógini hevur manningin á fiskiskipum, tá ið viðurskiftini ikki gera tað ógjørligt, rætt til 8 tímar hvíld um samdøgnið. Av hesum skulu seks tímar av hvíldartíðini vera samanhangandi. Umborð á trolarum eigur manningin tó rætt til 6 tíma vaktarskifti. Undantøk kunnu í einstøkum førum gerast, tá ið meirilutin av manningini kemur ásamt við skiparan um hetta.

Í nýggja sáttmálanum stendur, at kann veiðan ikki fáast til høldar við ásettu hvíldartíðini, skulu stig takast, so hvílarreglurnar kunnu haldast.

### Tøkniligar loysnir

Fiskimannafelagið fegnast um, at Reiðarafelagið nú hevur viðurkent, at tað eisini er teirra ábyrgd, at hvíldartíðirnar verða hildnar.

– Hetta kann slóða fyri, at tøkniligar loysnir verða framdar á hesum øki, soleiðis at hvíldarreglan kann haldast, sigur FF.

Felagið ásannar samstundis, at fiskimenn eisini hava eina ábyrgd í hesum sambandi.

– Ábyrgdin er, at tað ikki skal loysa seg at seta heilsuna í vága fyri at fáa uppí lastina nakrar tímar fyrr, enn tað annars vildi tikið, sigur Fiskimannafelagið.

### Umstøðurnar kannast

Felagið fer at seta eina kanning í verk av arbeiðstíðini umborð á fiskiskipum.

– Hetta kann gerast við at kanna dagbøkur og døgnlistar. Ein annar møguleiki er eisini at senda spurnarbløð umborð á skipini, har spurt verður, hvussu langa frívakt menn hava havt, dag um dag.

Fiskimannafelagið ætlar eisini at kalla Føroya Skipara- og Navigatørfelag til fundar fyri at tosa um, hvussu yvirmenn kunnu viðvirka til, at hvíldarreglan verður hildin.

Men í fyrsta umfari verður eitt skriv sent manningum, skiparum og reiðarum, har víst verður til protokollatið, sum feløgini hava gjørt um.

## Nakrar krónur til eftirlønina



*Umsíðir fingu fiskimenn í 2002 eina eftirlønarskipan, sum bæði reiðarar og fiskimenn sjálvir gjalda til. Sambært nýggja sáttmálanum, verður skipanin styrkt við inngjøldum frá báðum pørtum komandi árið*

**– Hetta er ein týdningarmikil partur í sáttmálanum, tá ið havt verður í huga, hvussu tungt tað hevur verið at fáa eina lógarásetta skipan á økinum, sigur Fiskimannafelagið**

SÁTTMÁLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var eitt stórt framstig hjá fiskimonnum, sum onga eftirlønarskipan hava havt, tá ið Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag í 2002 gjørdu avtalu um eina eftirlønarskipan, sum reiðarar eisini skulu gjalda sín part av.

Í løtuni er inngjaldið 27 krónur hjá reiðara og 20 krónur hjá fiskimanni fyri hvønn mynstraðan dag. Hesar upphæddir hækka í nýggja sáttmálanum í tveimum stigum, soleiðis at tær 1. juli 2005 verða 30 krónur úr reiðarans lumma og 22 krónur úr lummanum hjá fiskimonnum.

– Hetta ljóðar kanska ikki so nógv, men er í samsvar við lønargongdina í samfelagnum hesi tvey árini.

Fiskimannafelagið fegnast tó um, at hetta eisini er ein óbeinleiðis viðurkenning av, at talan er um eina skipan, har virðið av henni skal varðveitast í mun til lønarstøðið yvirhøvur.

### Einki í væntu

– Hetta er ikki minst týdningarmikið, tá ið havt verður í huga, hvussu tungt tað hevur verið at fáa eina lógarásetta skipan á økinum. Her kunnu vit ikki rokna við nøkrum, fyrr enn vit síggja tað, heldur FF og vísir á, at seinasta ivamálið í hesum sambandi er fráboðaða økingin í samhaldsfasta eftirlønargrunninum.

Fiskimannafelagið vísir á, at henda øking var tengd at einum skattalætta, sum nú sambært almennum fráboðanum er ivasamur.

Í nýggja sáttmálanum millum feløgini er avtalað, at 1. juli í ár leggja bæði reiðarar og fiskimenn eina krónu aftrat eftirlønini hjá fiskimonnum, og 1. juli 2005 leggja reiðararnir tvær krónur aftrat og fiskimenn eina.

## Eingin øking í prosentum

**– Eg haldi, at hetta er tað, sum vit kundu rokna við í tíðum sum hesum, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein**

SÁTTMÁLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Vit vóru ikki samdir um øll mál, men tað avgerandi er, at vit nú hava fingið ein nýggjan sáttmála, sigur Jákup Sólstein, sum ikki heldur, at grundarlag er fyri at økja um hýruútreiðslurnar, soleiðis sum gongdin í fiskiskipaflotanum er*

Tá ið hugt verður í nýggja sáttmálan millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag, eru eingi prosentir nevnd, hvørki uppeftir ella niðureftir.

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein, sigur, at eingi prosentir vórðu broytt undir samráðingunum millum feløgini.

– Burtursæð frá smáum justeringum, kunnu vit siga, at sáttmálin er óbroyttur.

Hann heldur ikki, at tað var so tungt hesaferð at fáa sáttmálan undir land, men onkur mál vóru á vegnum, sum partarnir í fyrstu syfti ikki vóru samdir um.

Jákup sigur, at Reiðarafelagið er nøgt við sáttmálan, sum nú er undirskrivaður.

Hann vísir á, at soleiðis, sum gongdin er í fiskiskipaflotanum við lágum fiskaprísum á øllum fiskasløgum, vildi Reiðarafelagið ikki hoyra talan um nakra hækking í prosentum. Hinvegin var sum nevnt heldur eingin lækking.

– Eg haldi, at hetta er tað, sum vit kundu rokna við í tíðum, sum hesum.

Jákup Sólstein vísir á, at fiskiskipaflotin hevur havt nøkur góð ár, men nú er vent, og tí er ikki ráðiligt at økja um hýruútreiðslurnar.

– Hetta er tað, vit komu ásamt um, og tað avgerandi er, at vit eru samdir og hava fingið ein nýggjan sáttmála, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum í stuttari viðmerking.